VINNU SÍÐURNAR

Nr. 245 • mikudagur • 22. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Íslendski verðinsmaðurin Orri Vigfússon takkar føroyingum:

# Tit vóru við til at bjarga laksinum



**Royndirnar hesi seinastu fimtan árini at steðga veiðuni eftir laksi á opnum havi hava givið úrslit. Stovnurin er við at koma fyri seg aftur, og er 2004 tað besta fyri frítíðarfiskarar í londunum við Atlantshav í 25 ár. –Hetta kunnu vit m.a. takka føroyingum fyri sigur Orri Vigfússon, sum er undangongumaður í hesi einastandandi og slóðbrótandi verkætlan, sum allur heimurin kann læra av**

STOVNSRØKT
*Jan Müller*

Tað eru júst fimtan ár síðani, at íslendski vinnulívsmaðurin Orri Vigfússon kom til Føroya og inniliga heitti á føroyingar um at gevast við at veiða laks á opnum havi, tí stovnurin varð við at verða niðurfiskaður. Í dag kann ein errin Orri og harvið eisini øll tey, sum vara av laksinum í Norðuratlantshavi fegnast um, at royndirnar at bjarga laksastovinunum hava eydnast. Nú eru nevniliga greið tekin um, at stovnurin er við at koma seg og hetta m.a. tí, at føroyingar og aðrar tjóðir lurtaðu eftir Orra Vigfússyni og góvust við veiðuni.

Í hesum sambandi hevur Orri Vigfússon júst verið á vitjan í Føroyum fyri at takka fyri stuðulin, sum føroyingar hava víst í hesum stóra og álvarsliga máli.

- Eg fari gjøgnum Vinnusíðurnar í Sosialinum, sum eisini tók hetta málið upp, tá eg var her fyri fimtan árum síðani, at takka øllum føroyingum, sum hava gjørt sítt til, at laksurin nú aftur er við at koma fyri seg.

Orri Vigfússon kom til Føroya í oktober í 1989 og helt ein óformellan fund við felagið Laksaskip, har hann heitti á felagið um at gevast við laksaveiðuni, tí stovnurin var hóttur. Felagið skuldi so fáa eina ávísa upphædd at lata fiskimonnum fyri mistu veiðuna. Laksaskip gekk við til at samráðast um málið og eftir samráðingar í umleið hálvtannað ár, tvs. í apríl 1991 varð ein avtala gjørd millum Laksaskip og grunnin, sum Orri hevði sett á stovn, um steðga veiðuni við tí endamáli at menna stovnin aftur. Grunnurin hevði til endamál at útvega pengar frá fólkum og stovnum og myndugleikum, sum mettu tað vera altumráðandi at steðga vaksandi laksaveiðuni fyri síðani at geva hesar pengar út aftur til fiskimenn, sum játtaðu at gevast við veiðuni. Hetta skuldi vísa seg at vera ein genial skipan, sum kom at venda eini niðurgongd í laksastovninum til ein vøkstur ístaðin.

## Vil steðga garnaveiði

Eftir at hava lagt botn í Føroyum og her fingið eitt góð úrslit at brúka yvirfyri øðrum eisini varð avtala gjørd við fiskimenn í Labrador, New Foundlandi, Grønlandi, Íslandi, Wales, Norðurírlandi, við Norðsjógvin og í Biskayavíkini.

– Øll hesi londini og økini hava hildið síni lyfti, og eingin hevur veitt laks í 15 ár. Nú er so eftir at fáa fiskimenn í Írlandi, onkunstaðni í Skotlandi og í Noregi at gevast við síni rekagarnaveiðu eftir laksi.

Annars er tað bara Írland, sum ikki hevur játtað at vera við í royndunum at steðga laksaveiðuni á opnum havi. Eg royni nú at sannføra írar um, at garnaveiðan fer sera illa við laksinum, soleiðis at hann ikki verður líkinda matvøra




*Kortið vísir, hvar laksurin ferðast og økini, har fiskiveiðan er steðgað og eisini øki, sum enn eru eftir at fáa í "foldina" tvs. har Orri og hansara fólk arbeiða við at fáa fiskimenn at gevast við eitt nú garnaveiðu eftir laksi.*